


# Vodafone lækkar gjøldini

**INTERNET** Allir privatir ADSL flatrate kundar hjá Vodafone fáa príslækkan og ferðhækkan

Eirikur Lindenskov

– Vodafone setur nú ferð á internetið í Føroyum. Ferðin á skjótasta sambandinum fer nú upp í 20 megabit. Samstundis økist ferðin á øllum ADSL internethaldum til privatkundar, sum hava flatrate frá Vodafone, og prísurin á øllum hesum haldum fer niður.

Soleiðis sigur Vodafone í fráboðan um príslækkingarnar.

– Allir privatkundar hjá Vodafone fáa nú meira ferð fyri pengarnar, tá teir eru á internetinum. Vodafone kom við flatrate til føroyingar og var veitarin, sum setti ferðirnar upp. Nýggju ferðirnar hava vit havt ætlanir um í eina tíð, og løtan er nú at fremja tær, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri á Vodafone, nú felagið hevur gjørt av at økja ferðina á øllum internethaldum og lækkar prísin á øllum ADSL flatrate haldum.

## Fakta

**Nýggju internetferðirnar eru hesar:**

**2 mbps = > upptil 3 mbps/0,5mbps (365,- kr. per mðr.) Príslækkan á 10 kr. um mánaðin**

**4 mbps = > upptil 10 mbps/1 mbps (445,-kr per mðr.) Príslækkan á 25 kr. um mánaðin**

**6 mbps = > upptil 20 mbps/1 mbps (495,- kr. per mðr.) Príslækkan á 115 kr. um mánaðin**

**10 mbps => upptil 20 mbps/1 mbps (495,-kr. per mðr.) Príslækkan á 300 kr. um mánaðin.**

Higartil hava privatkundar í mesta lagið kunnað keypt internetferð á 10 megabit, men Vodafone økir nú ferðina á hesum haldum upp til 20 megabit. Kundar, sum ídag hava 6 ella 10 megabit ferð, fáa nú ferðir upp í 20 mbps, og kundar við 4 mbps fáa 10 mbps. Hesir kundar fáa eisini eina príslækkan, sum er upp í 37 prosent. Kundar við 2 mbps fáa 3 mbps og eina príslækkan á 10 kr.

– Við hesum hava vit fingið ein meira einfaldna bygnað á okkara tænastum og munurin millum hægstu og lægstu ferð í prísi er minkaður nógv. Nú kunnu okkara kundar fáa 10 ferðir meira ferð fyri einans 130 kr. eyka um mánaðin og upload ferðin á 10 og 20 mbps verður 1 mbps.

Vodafone kunnar meira um hetta á heimasíðuni www.vodafone.fo, og hvat hugtakið »upptil« merkir, og um tað er neyðugt at skifta beinara (routara) fyri at fáa fullan ágóða av nýggju ferðunum.

Vodafone fremur hesar broytingar sjálvvirkandi fyri sínar kundar. Broytingarnar verða framdar leypandi í mars mánaði, og prísirnir eru galdandi frá 15 mars.

Sambært Vodafone kunnu hesini støðini ikki fáa 3 mbps breiðband enn:

Bøur, Dalur, Funningur, Gásadalur, Gjógv, Kunoy, Nólsoy, Norðradalur, Saksun, Syðradalur á Kalsoy og Syðradalur á Streymoy.

Kundar, sum hava semi-flatrate fáa ferðhækking, men ikki príslækking. Eingin broyting verður hjá kundum við Wimax breiðbandstøkni, verður sagt av Vodafone.

# Sangir úr dýpinum

**KONSERT** Tarira framførir konsert við tónleiki eftir Arvo Pärt

Tíðindaskriv

Kamarkórið Tarira, undir leiðslu av Sunleif Rasmussen, framførir komandi vikuskifti verk eftir tónaskaldið Arvo Pärt.

Fríggjakvøldið 11. mars klokkan 19:30 verður konsert í Vesturkirkjuni í Tórshavn. Leygardagin 12. mars klokkan 16:00 verður konsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum.

Arvo Pärt er føddur í 1935 í Estlandi og er ein av mætastu núlivandi tónasmiðunum í heiminum innan sakralan tónleik. Pärt byrjaði tónlistarligu útbúgvingina sum 7 ára gamal, og longu sum ungur tannáringur skrivaði hann sín egnan tónleik. Sagt verður um hann, at hann kundi bara rista tónar úr ermuni.

Síðani 1970 árini hevur Pärt ment sín heilt egna og sermerkta tónlistarliga stíl við sera minimalistiskari ljóðmynd har hann m.a. brúkar íblástur frá Gregorianskum sálmasangi. Undir russisku hersetanini av Estlandi rýmdi Pärt úr Estlandi og hevur búðleikast í Wien og Berlin, men í 2000 flutti hann til heimlandið aftur og býr nú í høvuðsstaðnum Tallinn.

Tarira ber stóran als til tónleikin hjá Arvo Pärt og hevur áður sungið verk eftir honum á konsert í 2003, og var móttøkan sera góð. Nú er stundin komin til aftur at seta framúr góðu verkini á konsertskránna.

Fyri veruliga at vísa margfeldið innan tónleikin hjá Pärt hevur Tarira valt at fáa Gudmund Mortensen, organist, at framføra eitt verk á urgu og hava fylgispæl til annað verk saman við kórinum. Harumframt fara tríggir strúkarar at hava fylgispæl til verkið "De Profundis", ið eisini er á skránni.



## Norðurlendskur týðarastuðul

**Stuðul til at týða skaldskap úr føroyskum til annað norðurlendskt mál, er leysur at søkja**

Stuðul kann verða veittur til at týða skaldsøgur, stuttsøgusøvn, yrkingar og yrkingasøvn, ævisøgur, ritroyndir og í summum førum annað tilfar, t.d. vísindaviðgerð ella fakbók av einumhvørjum slag.

Í summum førum verður eisini latin stuðul til týðing til annað mál enn norðurlendskt.

**Umsóknarbløð** fáast á www.nlh.fo, har reglurnar fyri studningsveitingini eisini eru at finna.

Seinasta freist at lata inn umsóknir í hesum umfarinum er 1.apríl.

**Umsóknin skal sendast til**
Guðrun Gaard, Tórsbyrgi 5, 100 Tórshavn.

Er ivi um okkurt, ber til at venda sær til Guðrun Gaard, gudrung@kallnet.fo